# handVERKARIN

2013 BLAÐ NR. 46 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# GONGD KOMIN Á MARKANGILSDEPULIN

# GÓÐI LIMUR



Í blaðnum hesaferð er eisini kunning um Sjúkragrunnin BATA.

Tað var í 2010, at vit gjørdu semju við Havnar Handverksmeistarafelag um felagið skuldi yvirtaka grunnin.

Meistarafelagið ynskti, at grunnurin var gjørdur upp og tikin av. Tað vildu vit ikki, tí vit mettu, og meta framvegis, at ískoyti úr grunnnum í samband við sjúkramelding ger góðan mun hjá nógvum limun.

Ein broyting, sum er gjørd er, at nú verður grunnurin umsitin av felagnum, og skulu limir senda umsókn til felagið í samband við sjúku.

Fráboðanin skal sendast í telduposti til: handverk@handverk.fo

## Summarfrí

Gjørt verður vart við, at skrivstovan steingir vegna summarfrítíð í viku 30 – 31 – 32 og 33. Og umsóknir til BATA skulu vera okkum í hendi innan 17 juli, um tær skulu vera avgreiddar áðrenn summarfrítíðina. Umsóknir, sum koma inn í summarfrítíðini verða ikki avgreiddar fyrr enn í viku 34.

Samstundis vil eg nýta høvi til, at ynskja øllum limun okkara við familju eitt gott summar, og góða Òlavsøku.

Eli Brimsvík
formaður.

## Í blaðnum hesa ferð: síða


Hent og góð ráð hjá limunum í havnar handverkarafelag . . . . . 3
Marknagilsdepilin slapp ígjøgnum nálareyga . . . . . 4
Eitt av heimsins kendastu bygningsverkum . . . . . 10
Áhugaverd hugskotskapping um byggiætlan . . . . . 16
Felagið eigur nú sjúkragrunnin BATA . . . . . 22
Sjónarhornið: Sanne Reinberg Samuelsen . . . . . 27
LØNARTALVA – 1. oktober 2012 Nr. 64 . . . . . 28



Útgevari: Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
Ábyrgdarblaðstjóri: Eli Brimsvík
Blaðstjórn: Media · Umbróting, prent og liðugtgerð: Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Skrivstovutíð: Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverkarin@handverk.fo · www.handverk.fo




# HENT OG GÓÐ RÁÐ HJÁ LIMUNUM Í HAVNAR HANDVERKARAFELAG

## Limagjald og lívstrygging:

Limagjaldið er kr. 500,00 um mánaðin, tá limir hava gjaldsavtalu. Í limagjaldinum er íroknað gjald fyri lívstrygging og gjald fyri sjúkragrunnin BATA.

Kr. 75,00 verða lagdar afturat í ómaksgjaldi hjá teimum, sum ikki hava fasta gjaldsavtalu.

## Tímaløn:

Tímalønin er frá 1. okt. 2012:
Kr. 126,54 (minstaløn )
3-ára starvsaldur gevur 1,6% lønarhækkan.
Frítíðarløn: 12%
Konta 6460-299.601.6 og 9181-299.700.4

## Eftirløn:

Arbeiðsgevarin: 13%
Løntakarin: 2%
Tilsamans: 15%
Konta: 9870-9905597

## Sjúkragrunnurin BATI: Er bert fyri limir í Havnar Handverkarafelag

Gjaldið til BATA er frá 1. mars 2013 í limagjaldinum
Umsiting: BATI
Postboks 203, 110 Tórshavn
Tlf. 354800 – fax 354801

## Lærlingar:

Lærlingar gjalda kr. 10,- pr. viku í limagjaldi.
Konta: 6460-401.200.5

## Lærlingalønir ( % av sveinalønini )

1. árið 32%
2. árið 40%
3. árið 45%
4. árið 55%
5. árið 70%

Eftirlønir til lærlingar: 7,5%
Konta: 9870-9905597

## Eftirútbúgvingargrunnurin VITAN

Arbeiðsgevarin:
10 oyru pr. tíma (eftir skatt )
Løntakarin:
10 oyru pr. tíma (eftir skatt)

## Umsiting: Vinnuhúsið

Postboks 1039, 110 Tórshavn
Tlf. 309900 – fax 309901
Teldupostur: mikkjal@industry.fo
Konta: 9181 – 495.879.0
Konta: 6460 – 101.278.0

# MARKNAGILSDEPILIN SLAPP ÍGJØGNUM NÁLAREYGA



Nú farið er undir verkætlanin at byggja Marknagilsdepilin fara vit her – í stuttum – at greiða frá, hvussu byggiætlanin var broytt og hvussu endaliga úrslitið gjørdist.

Tá ið tilboðini vóru latin upp í sambandi við bygging av Marknagilsdeplinum vístu tølini, at verkætlanini fór at kosta nógv meira enn verklagslógin, sum løgtingi hevði samtykt.

Hetta gjørdist ein so mikið stórur trupulleiki, at vit kunnu siga, at byggiætlanin kom í rættuligan vandasjógv. Støðan gjørdist – í hvussu er – so mikið álvarsom, at tað vóru tey sum mettu, at Marknagilsdepilin ikki fór at vera bygdur.

Sum ein avleiðing av, at byggiætlanini kom í hesa støðu var, at setti verkætlanarleiðarin, Heini Trónd Hansen valdi at siga seg úr starvi. Her kunna vit skoyta uppí, at uttan verkætlanarleiðara gjørdist ongin Marknagilsdepil; hetta venda vit aftur til seinni.

## Verkætlanin verður skorin

Fyri at loysa fastløstu støðuna fór Landsverk undir at kanna um tað ikki var møguligt at broyta ella skera av ætlanini soleiðis, at prísurin kundi fáast niður.

Tá hesar royndir vóru av vísti tað seg, at tað hevði eydnast Landsverk at skarva 92 milliónir kr. av kostnaðinum. Men hetta var kortini ikki nó mikið til at fáa samlaða kostnaðin av Marknagilsdeplinum niður á eitt støði, sum var í samsvar við verkfalslógina, sum løgtingi hevði samtykt.

Tað sum so hendi var, at Bjørn Kalsøe legði uppskot fyri tingið um at hækka játtanina úr 391 til 515 mió. kr. við innbúgvi.

Men sjálvandi bar ikki til at spara 92 mió. uttan at gera broytingar í byggiætlanini. Eftir uppskoti, sum Landsverk hevði gjørt, var samlaða víddin skorin við 2.000 fermetrum.

Ein partur av hesi minking var at skúlastovurnar, sum upprunaliga vóru 69,4 fermetrar, vóru skornar niður í 65,4. fermetrar. Men hetta var kortini ikki nó mikið.

Ein bygningur, sum skuldi standa leysur av deplinum til tað, sum nevnt var „instalatiónir" var strikaður og hesar funktiónir vóru fluttar inn í høvuðsbygningin.

Samlaða hæddin av deplinum var minkað við u.l. 4 metrum.

Harumframt var ein partur av glasfasaduni skorin; uppleggið hjá Landsverki var, at 20% av glasfasaduni skuldi gerast úr øðrum bíligari tilfari. Í hesum sambandi kunnu vit nevna, at atfinningarsamar røddir høvdu verið frammi um júst hendan partin av byggiætlanini.



Ein partur av spariætlanini er at strika partar av el-tilfarinum so sum vanligar avbrótarar og stikkontaktir og upprunaliga ventilatiónsskipanin er slept.

Og so er eftir at nevna, at sum heild skal bíligari tilfar brúkast, í mun til upprunaligu ætlanina; hetta snýr seg serliga um veggir, loft og gólv.

## Løgting, fíggjarnevnd og fíggjarmálaráðið

22. mars 2013 samtykti løgtingið endaligu verklagslógina, sum Marknagilsdepilin skal byggjast eftir.

Samtyktin heimilar landsstýrismanninum í mentamálum at brúka upp til 515 milliónir krónur til skúladepilin í Marknagili.

Tá málið var í Fíggjarnevndini hjá løgtinginum segði nevndin millum annað soleiðis: Fíggjarnevndin hevur av royndum staðfest, at kostnaðarætlan ikki heldur í almennum byggiverkætlanum. Tí hevur Fíggjarnevndin í samráð við landsstýrismannin í fíggjarmálum arbeitt fyri, at verklagslógir skulu umfata allar útreiðslur.

Í sambandi við viðgerð av hesum málinum hevur Fíggjarnevndin sett landsstýrismanninum spurning viðvíkjandi kostnaðar- og tíðarætlanini.

Í sínum svari til Fíggjarnevndina vísir landsstýrismaðurin til svar frá ráðgevarunum. Fíggjarnevndin leggur áherðslu á, at landsstýrismaðurin skal fylgja neyvt við verkætlan-

# MARKNAGILSDEPILIN SLAPP ÍGJØGNUM NÁLAREYGA







ini og staðiliga gera sínum ráðgevum greitt, at kostnaðarmetingin og tíðarætlanin skulu halda. Fíggjarnevndin vísir á, at málið hevur fingið eina drúgva og langa viðgerð, og heldur, at um tíðar- og kostnaðarætlanin skulu halda, er neyðugt, at arbeiðið verður sett í gongd beinanvegin.

29 tingfólk vóru í tingsalinum til 3. viðgerð, og øll atkvøddu tey fyri lógaruppskotinum hjá Bjørn Kalsø, landsstýrismanni í mentamálum.

Harvið er tað eitt samt løgting, ið nú stendur aftanfyri Føroya størstu byggiverkætlan, ið gerst góðar 60 milliónir krónur dýrari enn upprunaliga ætlað.

## Palli Henriksen gerst verkætlanarleiðari

Í tíðindaskrivi boðaði Landsverk frá, at 3. apríl 2013 var Hans Paula K. Henriksen – vanliga nevndur Palli Henriksen – settur í starv sum verkætlanarleiðara fyri størstu byggiætlanini í Føroya søgu.

Tað er ein royndur maður innan verkætlanarleiðslu, sum Landsverk hevur sett at standa á odda fyri byggingini av skúladeplinum.

Palli Henriksen, sum er 52 ára gamal og útbúgvin bygningsverkfrøðingur, hevur havt ábyrgd av fleiri stórum verkætlanum. Hann





kemur úr einum starvi sum verkætlanarleiðari hjá Tórshavnar Kommunu, har hann millum annað hevur staðið á odda fyri nýggja Boðanesheiminum og Skúlanum við Løgmannabreyt.

Áðrenn Palli Henriksen kom í starv hjá kommununi, var hann verkætlanarleiðari fyri Samtakið Hoyvíkshagin Suður – millum J&K Petersen og Byggitek – ið er størsta einstaka útstykking í Føroyum higartil.

Ewald Kjølbro, stjóri á Landsverki, fegnast um, at tað hevur eydnast fingið ein væl skikkaðan avloysara fyri Heina Trónd Hansen, sum frammanundan stóð á odda fyri verkætlanini, men nú er farin í annað starv í Danmark.

Talan er um eina sera stóra uppgávu, og tí var tað týdningarmikið, at vit fingu rætta persónin at standa á odda fyri verkætlanini við Marknagil. Tað ivist eg ikki í, er eydnast okkum við hesi setanini, sigur Ewald Kjølbro stjóri hjá Landsverki.

Palli Henriksen, sum eisini hevur havt egna tekni- og ráðgevingarfyritøku innan byggivinnu, sær fram ímóti at taka við nýggju uppgávuni.

Ongin ivi er um, at talan er um eitt ódnartak, men samstundis er hetta ein ómetaliga spennandi avbjóðing, sum eg ikki kundi siga nei til, sigur nýggi verkætlanarleiðarin Palli Henriksen.

Havnar Handverkarafelag ynskir Palli Henriksen og øllum teimum mongu, sum koma at vera partur av hesi verkætlan hepni og góðan byr.


SPEKT kann hjálpa tær við
Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum
SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir grannskoðarar


Ídnaðar- og garaguhurðar
Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92
Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn


rør-tænastan
v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80
Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión


SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR
www.tst.fo
skapandi umhvørvi
Tekniski Skúlin
.... ein virkin og góður samstarvsfelagi
Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum samstarvi við vinnu og læring
• vit seta lærlingin í miðdepilin
• vit nøkta tørvin hjá vinnuni
• vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika
Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo


Ein depil innan skipatænastur
www.mest.fo
At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.
Men MEST er eisini so nógv annað.
Vit bjóða m.a.
• Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
• Landsins størstu goymslu av eykalutum
• Projekt- og teknistovuarbeiði
• Stórar bedingar og turrdokk
• Leigu av sleipibátum og kranum
• Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)
MEST
MEST
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

# EITT AV HEIMSINS KENDASTU BYGNINGSVERKUM



Í 1957 vann ein tá púra ókendur arkitekturin eina arkitektakappingum, sum ikki færri enn 932 arkitektar um allan heim tóku lut í. Men synd er at siga, at vinnandi arkitekturin fekk tann sóma og heiður, sum hann hevði uppiborið frá teimum, sum byggjast skuldi fyri.

Bæði bygningsverkið og arkitekturin eru í dag so kend, at helst hava mong longu gitt, at kappingin hevði til endamáls at fáa uppskot inn til bygging av einum operahúsið í Sydney í Avstralia. Men kappingin var hørð, millum tey 932 uppskotini, sum vóru latin inn til kappingina.

Tey sum skipaðu fyri kappingini valdu uppskotið, sum danski arkitekturin Jørn Utzon hevði latið inn, og tað kunnu tey í dag bert fegnast um.

## Óendaliga nógvir trupulleikar

Hóast fá bygningsverk hava verið fyri so stórum trupulleikum í byggitíðarskeiðnum, so er onki at taka seg aftur í, at uppskotið hjá Utzon lág langt frammanfyri øll onnur uppskot. Av somu orsøk telist Operahúsið í Sydney millum tey verk, sum í dag standa á listanum, sum hevur heitið: Heimsins undurverk í 20. øld.

Sambært avtalu skuldi Utzon standa fyri arbeiðinum til húsið var liðugt. ***Tá farið var undir byggiarbeiðið var samlaða játtanin 50 milliónir danskar krónur.*** Hetta vísti seg kortini skjótt at vera alt ov lítið. Í fleiri umførum var tí nógv meira peningur játtaður.

## Áhaldandi meirkostnaður

At bygningurin koma at kosta nógv meira enn mett frammanundan, fekk sjálvandi avleiðingar fyri samstarvið millum Jørn Utzon og tey, sum høvdu fíggjarligu ábyrgdina.

Og í 1966 var støðan vorðin so mikið spent, at Jørn Utzon valdi at siga starvið frá sær. Hetta skundaði avstralski vinnumálaráðharrin, David Hughes, at játta honum.

Tá vóru 400 milliónir játtaðar og brúktar; samstundis sum húsið stóð í hálvum gekki.

Tað var ein vónbrotin og vreiður Utzon, sum vendi heim aftur til Danmarkar í 1966. Tá vóru 9 ár liðin síðan fyrsti spakin var ísettur. Í hesum sambandi gjørdu fleiri heimsgitnir arkitektar vart við, at Utzon átti at gjørt arbeiði sítt liðugt, og at tað ikki var minni enn ein stór tragedia um hetta ikki hendi, men so skuldi ikki vera.

## Kostnaðurin gjørdist 700 milliónir

Tá bygningurin at enda stóð liðugt, vísti kostnaðurin seg at vera komin upp um 700 milliónir krónur.

Tá hetta varð kunngjørt fóru tíðindi sum eldur um allan heim, og fjølmiðlarnir vóru grammir við atfinningum ímóti Utzon, sum hevði sett sær fyri at gera eitt listaverk uttan at hugsa um útreiðslurnar. Tá arkitekturin – í hesum sambandi – varð biðin um eina viðmerking var hann skjótur at svara, at Katedralurin í Chartres ikki var bygdur eftir eini øld, slíkir bygningar kunnu ikki avrikast í bráskundi. Og so var Utzon aftur á forsíðunum, so hann dugdi ikki bara at tekna.

## Ongan broytingar á útsíðunum

Tá Operahúsið í Sydney stóð liðugt vóru ongar broytingar gjørdar í fasaduni, men inn-



rættingin og útgerðin í húsinum var broytt í mun til tað, sum Utzon hevði ætlað. Ein avleiðing av hesum er, at tað tíverri ikki ber til at sýna fleiri av heimsins best umtóktu opera'um, t.d. fleiri hjá Wagner.

Tá húsið varð tikið í nýtslu varð skipað fyri stórum hátíðarhaldið við luttøku av m.a. bretsku drotningini. Tá var tað ikki Utzon, sum drotningin tók í hondina á og ynskti tillukku. Henda heiður fekk tó ein annar dani, John Winther. Hann var giftur við kendu opera-sangarinduni Lone Koppel, sum tá var operaleiðari har.

## Utzon fekk uppreisn

Stutt eftir, at húsið var tikið í nýtslu fekk Jørn Utzen uppreisn í Avstralia; tá fekk hann eina umbering og heiðursmerkið „The Order of Australia". Men Utzon var yvir og farin úr Avstralia, og vitjaði ongantíð aftur í landinum, hóast uppreisn og heiðursmerki.

Hóast allar trupulleikarnar er operahúsið vorðið ein av heimsins mætastu bygningsverkum, og húsið hevur á hvørjum ári omanfyri 100.000 vitjandi.

Líka síðani bygningurin var tikin í brúk hava so at siga øll ferðafólk, sum hava vitja Avstralia, eisini vitja Operahúsið í Sydney, tað er vorðið til eitt „must".

Húsið hevur í dag, við sínum 10 sermerktu betongskeljum, sama týdning fyri Avstralia, sum Big Ben hevur fyri Ongland og Eiffeltornið hevur fyri París.

## Utzon kendur um allan heim

Seinni gjørdist hann professari við bústaði á Hawaii, og teknaði nógvar bygningar, sum í dag eru kendir. Í hesum sambandi kunnu vit nevna tveir; parlamentsbygningin í Kuveit og Bank Melhi í Teheran.



Hóast navn hansara gjørdist kent og væl umtókt um allan heim, so fekk hann kortini onga heilt stóra uppgávu í Danmark, tó so, her eiga vit at nevna Kirkjuna í Bagsværd, Paustians Møblahús og Kingohúsini í Hellerup. Seinastu ár síni ferðaðist hann nógv og búði í húsum sínum í Hellebæk ella á Mallorca.


STÁSILIG HØLIR TIL YMISK ENDAMÁL





Hølini verða útleigað til limir og onnur uttan fyri felagið.
Talan kann vera um feløg, stovnar ella einstaklingar.

www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR KOMMUNA


Linde Gas
AGA
FØROYA GASSØLA
Ídnaðar- og propangass
Skerlútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Kaligass
Upplatingartíðir :
mána, -friggjadag
8:00 - 17:00
Tlf, 315544
e-mail: Gassola@gassola.fo
www.gassola.fo


Húsavarðartænastan
Brattalíð 8 | Tórshavn | hvt@olivant.fo | Tel. 29 00 29
OGNA TÆR TÍN EGNA HÚSAVØRÐ
- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð
Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.
Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.
Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.
Reinsa við turr-ísi
Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing. Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.
Betong-saging
Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm. Ring og hoyr nærri.
Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í sambandi við bygging, umbygging og viðlíkahald av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum...

# ÁHUGAVERD HUGSKOTSKAPPING UM BYGGIÆTLAN

Fyrrverandi Húsalánsgrunnurin, ið nú hevur heiti BÚSTAÐIR, skipaði fyrr í ár fyri áhugaverdari kapping í sambandi við, at stovnurin hevur eitt øki tøkt at byggja á úti í Mattalág í Havn.

Í eini lýsing varð greitt soleiðis frá ætlanini: Bústaðir hava eitt øki á støðd við ein fótbóltsvøll í Vesturbýnum. Har fara vit, í samstarvi við Tórshavnar kommunu, at skapa eitt serstakt umhvørvi. Vit ynskja ein vælvirkandi og framtíðarvendan býarpart.

Ver við í hugskotskapping og kom við boðum uppá, hvørjar karmar tey, sum koma at búgva har, og grannalagi fara at fáa.

Vit hugsa okkum ein býling við 25 ella fleiri bústøðum, sum í ymisleika eru so fjølbroyttir, at tað er rúm fyri øllum. Vit hugsa okkum ein býling, sum bæði er ein ágóði og eitt prýði fyri økið og grannalagið, og sum samstundis er ein arkitektonisk heild.

Oman Mattalág skal eisini vera sýnisgluggi fyri komandi bygging í Føroyum. Tí er tað ein treyt, at innsendu hugskotini vísa á, hvussu umhvørvið og orkunýtsla kunnu spæla saman í arkitektonisku heildini.

Ver við í kappingini og ger eina neyva ætlan um, hvussu vit byggja ein nýskapandi og spennandi býling mitt í Havnini.

Hugskotskappingin er í tveimum pørtum: Fyrri partur er ein høvuðsætlan fyri alt økið, meðan seinni partur fevnir um 3 til 5 ymisk íbúðarsnið. Luttakararnir í hugskotskappingini kunnu gera uppskot til allan býarpartin ella til einstøk íbúðarsnið.

## Úrsliti av kappingini

Tíðarfreist fyri innlating av uppskotum var sett til 1. februar 2013, og tá freistin var úti at senda uppskot inn til kappingina hevði stovnurin fingið tilsamans 19 uppskot.

Ítøkiliga skuldu luttakararnir tekna eitt felagshús, 3-5 ymisk íbúðasnið og eitt rekreativt øki.

Íbúðirnar skuldu vera fjølbroyttar og hóskandi til ymiskar samfelagsbólkar, t.e. gomul, fólk við serligum tørvi, stakar uppihaldarar, ung pør við ella uttan børn, støk og lesandi. Eisini var ein treyt at partar av byggjarínum skuldu byggjast til ein prís, ið ger tað møguligt at leiga íbúðirnar út fyri 5.500 kr um mánaðin, íroknað hita.

Dómsnevndin avgjørdi at lata eina 1. virðisløn, onga 2. virðisløn, men í staðin tvær 3. virðislønir fyri bestu uppskotini til høvuðsætlan.

### Virðislønirnar vóru hesar:

Virðisløn kr. 100.000 fyri uppskot til høvuðsætlan: MAP arkitektar

Virðisløn kr. 50.000 fyri uppskot til felagshús: Ragnar Zachariassen

Virðisløn kr. 50.000 fyri uppskot til íbúðaøki og íbúðasnið: Ósbjørn Jacobsen

Tað verða ikki MAP arkitektar, ið koma at tekna bygningarnar, ið skulu standa á økinum. Tað er Ragnar Zachariassen, ið eigur vinnandi uppskotið til felagshús, og Ósbjørn Jacobsen, ið átti besta íbúðasniðið, og hesi verða bygd á økið.



## Uppskotið hjá MAP arkitektum

### Úr dómsnevndarálitinum:

Fyrstavirðislønin fyri høvuðsætlan verður latin uppskotinum fyri eina greiða og vælvirkandi skipan av økinum. Høvuðsatkoman hjá bilum er frá Mattalágvegnum, umframt at ein sekunder atkoma hjá bilum er frá Jákup Nolsøesgøtu. Høvuðsparkeringsplássið við atkomuna frá Mattalágvegnum fær samband við økið við felagshúsið.

Felagshúsið er staðsett í miðjuni av bygginini og hevur gott samband við íbúðabólkarnar. Samstundis gevur staðsetingin móti fríøkinum norðan fyri møguleika fyri, at felagshúsið eisini kann nýtast av grannaognunum. Felagshúsið hevur eisini samband við høvuðsparkeringsplássið við Mattalágvegin, og vil hetta bæði geva møguleika at gera felagshúsið meira aktivt og attraktivt, og lætta um hjá gestum uttanífrá, sum skulu til tiltøk í felagshúsinum.

### Íbúðarbólkar

Vístu íbúðarbólkarnir kunnu virka og knýta seg rímuliga til felagshúsið. Allar inngongdir til íbúðirnar venda inneftir móti túnum og felagsøkjum, og skapar hetta møguleika fyri lív á hesum økjum.

Valið av innrætting annars av bústaðunum sýnist tó vera gjørt uttan atlit til tún og felagsøki, og venda hvørki køkur ella stova ímóti túnum og felagsøki.

Dómsnevndin vil geva sína viðurkenning av, at durur og WC-rúm allastaðni eru í støðd og skapi, sum gera tey nýtulig hjá fólki í

# ÁHUGAVERD HUGSKOTSKAPPING UM BYGGIÆTLAN





koyristóli, samstundis sum tey hjálpa um hjá fólki við avmarkaðum førleika annars, og skapa betri nýtslumøguleikar yvirhøvur.

Íbúðarsnið C er í støddi og skapi sera nýtuligt. Samstundis er møguligt, uttan at hetta er víst, at býta um uppá innrætting, so t.d. stova og stóra kamarið býtir pláss og, at eitt uppihaldsrúm sostatt kemur at venda móti túni og felagsøkjum. Tað hevði eisini verið gjørligt at stytt íbúðina við taka tey tvey smølu kømrini burtur og havt eina góða íbúð til tvey fólk eftir.

## Uppskotið hjá Ragnar Zachariassen

### Úr dómsnevndarálitinum:

„Virðislønin verður latin, tí talan er um eitt sera gjøgnumarbeitt uppskot til felagshús. Tað sýnist sum, at tonkt er gjøgnum øll viðurskifti, sum knýta seg til felagshúsið. Talan er um eitt felagshús, sum vil geva bústaðarøkinum eyka kvalitetir. Felagshúsið er staðfest soleiðis, at tað hevur kjallara, men gjørlig vil eisini vera at nýta húsið uttan henda kjallaran.

Dómsnevndini dámar væl inn- og útspringini í facadur á bústaðareindunum. Tó sýnist tekjuloysnin at vera uttan samsvar við facadurnar, og virkar yvirhøvur tung og ómotiverað.

At leggja parkeringina heilt uppundir stuðlamúrin til húsini við Íslandvegin sýnist heppin loysn.“

## Uppskotið hjá Ósbjørn Jacobsen

### Úr dómsnevndarálitinum:

„Virðislønin verður latin fyri sannførandi uppskotið til íbúðarøki og íbúðarsnið „Bólkur 1 Túnbýlingurin“. Tað hevur veruliga eydnast at skapa ein bústaðarbólk, sum stimbrar uppundir kensluna av felagsskapi. Tað varda felags túnið inni í bólkinum gevur góðar møguleikar fyri uttandura uppihald og víðkar soleiðis indirekta um bústaðirnar. Størru íbúðarsniðini hava harumframt egin vard útiøki. Nóg nógv pláss er sett av til køkar. Summir bústaðir hava WC og bað hóskandi til fólki við rørslutarni, og tilsvarandi pláss annars í bústaðinum. Við hóskandi menning av íbúðarsniðunum kundu óivað fleiri av bústaðunum gjørst hóskandi fyri fólki við rørslutarni. Lýstu orkuviðurskiftinini og fíggjarviðurskiftinini eru á støði við ella nær við ynskini í kappingarskránni, og fær hetta í sambandi við sannførandi loysnuna annars dómsnevndini at meta hetta uppskotið sum besta boðið uppá loysn av uppgávuni.“

Innkeypið verður latið fyri áhugaverda uppskotið til íbúðarøki og íbúðarsnið „Bólkur 4 Strong-býlingurin“. Arbeitt er við bæði felags og privatum terrassum.

Tó hevur henda loysnin nógvar facadur, og kann hetta hava negativan ávirkan á orkuviðurskifti og prís.

Summir bústaðir hava WC og bað hóskandi til fólki við rørslutarni, og tilsvarandi pláss annars í bústaðinum.

## Framsýning hjá Østrøm

Seinni vóru innkomnu uppskotini sýnd fram í fabrikkini hjá Østrøm. Áhugin fyri kappingini og framsýningini var stórur millum fólk, og hetta sást eisini aftur í, hvussu væl framsýningin varð vitjað.

Til virðislønarhandanina vóru um 300 fólk møtt, og um vikuskiftið vitjaðu millum 1.000 og 1.500 fólk framsýningina.



# Nýggjan køk?

- vit hjálpa tær at finna dreymakøkin






**NÝGGJUR SVARTUR EKSLUSIVUR OG ELEGANTUR KØKUR**

Nýggjasti mótin innan køkar í løtuni er svart og hvítt. Tiskil hevur Aubo framleitt nýggju lúkuna Melinga Svart, sum beinan vegin bleiv ein bestseljari. Melinga fylgir mótanum, køkurin er einkul, stílreinur og longu blonku handtøkini eru eitt grafiskt íkast til beinu linjurnar.

Vit hjálpa tær fegin við at tekna køkin, soleiðis at hann hóskar júst til tín. Tú skalt bara taka mát av rúminum. Til ber eisini at siggja fleiri køkar frá á www.2x3.fo.

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

Heykavegur 4 · 110 Tórshavn · Tel. 311250 · 2x3@2x3.fo · www.2x3.fo



Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo




BYGMA BALSLEV

...til handverkaran








## Heildarloysnir frá Articon

ÁRSINS VIRKI 2008

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

# FELAGIÐ EIGUR NÚ SJÚKRAGRUNNIN BATA

Havnar Handverkarafelag hevur nú einsamalt ábyrgdina av sjúkragrunninum, sum nevnist BATI.

Endamálið hjá hesum grunni er, at tímaløntir limir skulu hava rætt til dagpening, sum ískoyti fyri mista inntøku úr hesum grunni. Hetta hevur verið endamálið hjá grunninum síðan hann varð settur á stovn í 1971.

Og í reglugerðini hjá grunninum eru treytirnar – fyri at fáa stuðul – soljóðandi:

At tann sjúki er virkin limur í Havnar Handverkarafelag.

At limagjaldið er goldið.

Sjálvstøðugir limir í felagnum eru eisini fevndir av hesi reglugerð, um teir lúka treytirnar omanfyri og annars treytirnar fyri at fáa dagpening sambært almennu dagpengaskipanini.

## Soleiðis hevur gongdin verið

Hyggja vit aftureftir, so var tað soleiðis, at Havnar Handverksmeistarafelag og Havnar Handverkarafelag settu grunnin á stovn í 1971, og hevur hann virka frá 1. mai 1973.

Til samráðingarnar í 2007 var ynski frá Meistarafelagnum, annaðhvørt at niðurleggja grunnin ella, at Havnar Handverkararfelag yvirtók grunnin.

Havnar Handverkarafelag var og er av tí áskoðan, at grunnurin er eitt gott íkast til útgjaldið, sum fæst frá dagpeningaskipanini, og vildu Havnar Handverkarafelag tí halda áfram við at reka grunnin.

Eftir samráðingar millum feløgini í 2010 varð avrátt, at vit skuldu yvirtaka grunnin, og nú kunnu vit siga, at tað formliga er komið uppá pláss.

Vit hava gjørt neyðugar broytingar, og dagføringar í reglugerðini soleiðis, at hon nú hóskar betur til nútíðina og samfelagið vit liva í. Okkara vón er, at limir okkara framvegis fara at fáa gagn av hesum.

## Reglugerðin fyri sjúkragrunnin BATI

**§ 1.** Navn grunsins er BATI. Havnar Handverkarafelag eigur grunnin, og heimstaður grunsins er Tórshavn.

**§ 2.**
Tímaløntir limir Havnar Handverkarafelags hava, verða teir sjúkir, rætt til dagpening úr sjúkragrunninum sum ískoyti fyri mista inntøku.

*Stk. 2.* Treytirnar fyri rætti til hesa hjálp eru:

a) At tann sjúki er virkin limur í Havnar Handverkarafelag.
b) At felagsgjaldið er goldið.

*Stk. 3.* Sjálvstøðugir limir í felagnum eru eisini fevndir av hesi reglugerð, um teir lúka treytirnar omanfyri og annars treytirnar fyri at fáa dagpening sambært almennu dagpengaskipanini.

**§ 3.** Rætturin til dagpeningahjálp er treytaður av, at handverkari seinastu 4 vikurnar, áðrenn hann er vorðin sjúkur, hevur havt í minsta lagi 40 tíma arbeiði, fyri at fáa fult endurgjald upptil 90%. Annars verður útgoldið lutfalsliga eftir tímatali

a) Feriutíðin telur ikki við.
b) Í verkfalli og verkbanni fellur rætturin til dagpening burtur.

*Stk. 2.* Eru á felagsins øki arbeiðsgreinir, har stuttir arbeiðssteðgir eru, kann stýrið víkja frá reglunum, nevndar eru í stk. 1.

**§ 4.** Dagpeningahjálpin fyri fult óarbeiðsføri av sjúku er 90% av handverkaralønini, ið tá er, av hesum verður eisini goldin feriuløn.

*stk. 2.* Sjúkragrunnurin BATI skal bert rinda munin millum ta upphædd, tann almenna dagpeningaskipanin rindar, og ta upphædd, BATI hevur fyriskipað.

*stk 3.* BATI skal, tá talan er um skaða á arbeiðsplássi, gjalda handverkara munin millum tað, sum fæst frá almennu dagpeningaskipanini og fult viðurlag fyri vanliga vikuløn í upp í 14 dagar og síðan eftir galdandi reglum.

*Stk. 4.* Dagpeningahjálpin verður ikki goldin í førum, nevnd niðanfyri.

a) Tá sjúkan er av tílíkum slag, at hon kemur undir tryggingarlógina.
b) Tá tann sjúki sjálvur við vilja ella av grovum gáloysni hevur voldað sær sjúkuna.
c) Tá óarbeiðsførið er komið av drykkjuskapi.
d) Dagpeningahjálpin verður ikki goldin fyri frídagar fyriskipaðir við lóg.
e) Dagpeningahjálpin verður ikki goldin í feriutíðini.
f) Verða almennu lógirnar broyttar og samsvara soleiðis ikki við tær uppsettu reglunar í hesari reglugerð, verða tær broyttar soleiðis, at tær altíð samsvara almennari lóggávu.

**§ 5.** Dagpeningahjálpin tekur við frá 3. sjúkradegi í hvørjum sjúkraskeiði og kann verða goldin upp í 20 vikur, í 6 mánaðir á rað.

*Stk. 2.* Varar sjúkan í 2 vikur ella longur, verður goldin frá fyrsta degi.

*Stk. 3.* Dagpeningurin verður goldin fyri 5 dagar um vikuna,

*Stk. 4.* Fyrsta útgjaldingin fellur fyrsta fríggjadag eftir triðja sjúkradag og síðan eina ferð um vikuna.

**§ 6.** Verður umsóknin um dagpening latin inn í seinasta lagi 30. sjúkradagin, verður tá dagpeningurin goldin frá triðja degnum. Um so er, at umsóknin kemur seinni, verður tá dagpeningurin goldin frá tí degi, umsóknin kemur inn, um ikki serligar umstøður eru, so at frávik kunnu verða gjørd frá hesum.

*Stk. 2.* Umsóknin skal verða skrivað á serligt umsóknarblað, og skal umsøkjarin undir trúnaðartreytum siga frá sjúku sínari og annars geva aðrar upplýsingar, sum eru týdningarmiklar fyri at gera av rættin til dagpening.

*Stk. 3.* Umsóknarblað skal umframt verða undirskrivað av arbeiðsgevara við neyðugum upplýsingum.

*Stk. 4.* Er umsøkjarin arbeiðsleysur, tá umsóknin verður latin inn, skal læknaváttan verða løgd við umsóknini.

*Stk. 5.* Er umsøkjarin ikki arbeiðsførur, tá tvær vikur eru lidnar frá tí, at sjúkan tók seg upp, kann grunnurin, tá tá verður hildið neyðugt, krevja læknaváttan.

# FELAGIÐ EIGUR NÚ SJÚKRAGRUNNIN BATA

*Stk. 6.* Grunnurin kann annars í øllum førum krevja læknaváttan, heldur hann tað vera neyðugt. BATI rindar fyri kravda læknaváttan.

**§ 7.** Fingin dagpeningur frá almennu dagpeningaskipanini, sjálvbodnu dagpeningatryggingini ella vanlukkutryggingini skal verða drigin frá tí hjálp, ið BATI skal gjalda. Sama geldur, fær tann sjúki á annan hátt samsýning fyri mista inntøku.

*Stk. 2.* Um so er, at onkur á órættvísum grundarlagi hevur útvegað sær dagpening, missir hann rættin til hjálp fyri ta tíð, sum eftir er av gjaldsskeiðnum, og órættvíst útgoldin hjálp skal verða goldin grunninum aftur. Í slíkum førum kann strýrið fyri grunnin taka avgerð um at sýta tí sjúka rætt til dagpeningahjálp í gjølla tilskilaða tíð, sum tó ikki má fara upp um 2 ár.

**§ 8.** Dagpeningur verður goldin úr grunninum. Inntøka er tann peningur, sum handverkarar gjalda í hann, og peningur, sum á annan hátt fellur til grunnin. Skyldur grunsins at veita dagpening røkka bert so leingi, grunnurin hevur tøkan pening.

*Stk. 2.* Gjald handverkarans í grunnin er partur av limagjaldinum til Havnar Handverkarafelag, sum stýrið saman við nevndini í Havnar Handverkarafelag til hvørja tíð ásetir. Fram til 1. mars 2013 eftirheldur meistari 15 oyru pr. tíma hjá handverkara at flyta til grunnin.

*Stk. 3.* Handverksmeistari hevur skyldu at taka gjald handverkaranna av lønini hvørja viku.

*Stk. 4.* Handverksmeistarin hevur skyldu innan 10 dagar í hvørjum fjórðingsári ella tá lønin verður útgoldin, at lata grunninum yvirlit yvir navn og upphædd hjá hvørjum einstøkum handverkara, sum hevur verið í arbeiði. Yvirlitið skal innihalda upphædd sum handverkari rindar.

*Stk. 5.* Skyldar handverksmeistari grunninum pening sambært § 8, stk. 2, og skuldin er eldri enn 1 mánað og er ikki goldin í seinasta lagi 8 dagar eftir tað, at hann er kravdur eftir henni, kann hendan skuld tá verða innheintað á vanligan rættarligan hátt.

**§ 9.** At stýra grunninum er eitt stýri, sum er mannað á sama hátt og við somu manning sum nevndin í Havnar Handverkarafelag. Stýrið skal umsita grunnin og taka sær av ivamálum viðvíkjandi umsitingini og av tílíkum málum, sum annars koma undir grunnin. Stýrið ger av, hvør hevur dagligu umsitingina av grunninum.

*Stk. 2.* Stýrið letur góðkendan grannskoðara grannskoða roknskapin, Stýrið setur grannskoðaran.

*Stk. 3.* Grunnurin umsitur inngoldið gjald í grunnin og dagpeningahjálp úr grunninum.

*Stk. 4.* Ognir grunsins skulu umsitast fult forsvarliga og á tryggan hátt eitt nú við at hava pening innistandandi í peningastovni, íløgur í virðis- og lánsbrøv og útlán til kommunur.

*Stk. 5.* Í ivamálum kann stýri grunsins taka sær sakkøna hjálp, ið verður lønt av inntøku grunsins.

*Stk. 6.* Umsitingarútreiðslur grunsins verða goldnar av inntøkum grunsins. Stýrislimirnir fáa ikki samsýning fyri sítt arbeiði fyri grunnin.

**§ 10.** Roknskaparár grunsins er frá 1. jannuar til 31. desember.

*Stk. 2.* Grannskoðaður roknskapur skal verða lagdur fram á árliga aðalfundinum hjá Havnar Handverkarafelag.

**§ 11.** Reglugerðin kann verða broytt, heldur stýrið tað verða neyðugt, men broytingarnar skulu verða lagdar fyri aðalfund Havnar Handverkarafelags til góðkenningar. Eru broytingarnar av slíkum slagi, at peningur í grunninum ætlandi skal nýtast til annað endamál enn sbr. hesi reglugerð krevst samtykt um hetta á tveimum fylgjandi aðalfundum Havnar Handverkarafelags og við ¾ av greiddum atkvøðum á báðum aðalfundum.

**§ 12.** Verður frá almennari ella aðrari síðu skipað fyri sjúkrahjálp, ið ger grunnin óneyðugan, verður hann tá tikin av. Til at taka grunnin av krevst samtykt á tveimum aðalfundum Havnar Handverkarafelags á sama hátt sum

*Stk. 2.* Grunnurin fellur burtur, tá ið fjórðingsárið endar, og skal verða lýst í almennum lýsingarblaði.

*Stk. 3.* Ognir grunsins verða gjørdar upp og verða latnar til tað endamál, sum stýrið ger av. Stýrissamtyktin skal somuleiðis góðkennast á tveimum aðalfundum Havnar Handverkarafelags á sama hátt sum § 11.

**§ 13.**

Hesin sjúkragrunnur er settur á stovn sum lið í sáttmálasamráðingum millum handverkarar og handverksmeistarar 1. mai 1971.

Reglugerðin er broytt 1. januar 1984, 8. februar 1999 og 1. mars 2005. Seinast 21. februar, 2011 í samband við, at Havnar Handverkarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag eru vorðin samd um, at Havnar Handverksmeistarafelag er leyst frá øllum rættindum og skyldum hjá grunninum.

Tórshavn tann 15. februar 2012

Stýri fyri BATA:
Eli Brimsvík, form
Danial P Djurhuus, næstform
Sofus Joensen, stýrisl.
Jacobus Kamminga, stýrisl.
Hjalti Jensson, stýrisl.




# SJÓNARHORNIÐ: SANNE REINBERG SAMUELSEN



**Núverandi starv:** Málari hjá Una Zachariasen.

**Aldur:** 51 ár.

**Maki:** Thorleif K. Samuelsen.

**Børn:** Peter 21 ár og Olaf 20 ár.

**Handverkara útbúgving:** Bygningsmálarasveinur.

**Læra byrjað:** 1. September 1979.

**Tekniskur skúli:** Tekniski Skúlin í Odense.

**Útlærd:** 2. september 1982.

**Sveinastykki:** Ein básur á Tekniska skúla í Odense.

**Útlærd hjá:** Harry S. Mikkelsen í Odense.

**Arbeitt sum sveinur hjá:** Jørgen Jensen Odense, Peter Ziebold i Zurich, Henning Sørensen og Pole Mohr Poulsen í Tórshavn.

**Frítíðarítriv:** Kórsangur, list, ull, høsn, hundar, urtagarður og at ferðast.

**Besta bók:** Mær dámar væl at lesa bøkur um ferðamøguleikar og ferðamál. Havi ikki lisið aðrar bøkur í fleiri ár.

**Besti sangur:** Bohemian Rhapsody við Queen.

**Besti filmur:** Den eneste ene hjá Susanne Bier.

**Er tað okkurt serstakt arbeiði, sum tú minnist væl:** Eg var við, tá kirkjan í Leirvík bleiv dekorerað. Tummas Mikael Smith var konsulentur, hann legði lag á, tá vit byrjaðu og fylgdi við arbeiðinum. Tað var læruríkt.

**Hvussu eitur besti handverkarin, sum tú veit um:** Durita Åbak Hansen.

**Besti sjónleikari:** Meryl Steep og Mads Mikkelsen.

**Hvør heldur tú hevur mynda tín persón mest:** Nógv ymisk fólk, sum eg havi møtt á vegnum ígjøgnum lívið.

**Hevur tú ein ella fleiri søguligar persónar, sum hugtaka teg:** Nelson Mandela, Mahatma Ghandi og Piet Hein. Eg má eisini nevna Johannes Møllehave, hóast hann er núlivandi. Hann hugtekur meg, hevur vísdóm, orku og eg má siga, at hansara optimisma er unik.

**Hvør er tín størsta fyrimynd:** Tað er móður mín, men hon er tíverri ikki ímillum okkum.

**Fartelefon:** Fekk fyri stuttum eina Nokia Asha 300.

**Telda:** Asus.

**Bilur:** Toyota Corolla.

**Hvat heldur tú um eftirlønina hjá Havnar Handverkarafelag:** Tað er umráðandi, at eftirlønin er tryggjað. Vónandi fer landsstýri, við longum fingrum, ikki eisini at krevja skatt av eftirlønini, tá hon verður útgoldin.

**Hvat heldur tú um samlagstryggingina hjá Havnar Handverkarafelag:** Hon er í fínasta lagi ;)

**Hvat heldur tú er størsta avbjóðingin hjá einum handverkara í dag:** Eg haldi tað ræður um at fylgja við menningini, uttan at missa tað góða handverki. So vit altíð ERU handverkarar og duga grundarlagið undir handverkinum, sum vit hava lært.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:** Góðir samstarvsfelagar, blíð smílandi, vinarlig fólk, sólskin og rættvísi.

**Hvat kann øsa teg:** Eg orki ikki fyri ráðaríkum, følskum og arrogantum lygnarum, sum vilja leggja alt undir seg.

# LØNARTALVA – 1. OKTOBER 2012 NR. 64

**Tímaløn handverkarar:**

| | | |
|---|---|---|
| Longri útbúgving | | kr 126,54 |
| Styttri útbúgving | | kr 121,43 |

| | |
|---|---|
| **Fastløntur handverkari:** | kr 21.933,18 |
| - Fyri 3 ára starvstíð | Kr 22.284,11 |

**Yvirtíðarlønir:**

| | | |
|---|---|---|
| Fyrstu 4 tímarnar | + 35% | kr 170,83 |
| Næstu 3 tímarnar | + 60% | kr 202,46 |
| Fylgjandi tímar | + 100% | kr 253,08 |
| Leygar-, sunnu- og halgidagar | + 100% | kr 253,08 |

1. mai og nýggjársaftan eru heilir frídagar.
Flaggdagur, grundlógardagur,
1. nov., jólaaftan eru frídagar aftaná kl. 12.00
og arbeiði í mattíð + 100% kr 253,08

**Viðbøtur: + hesi % av handverkaralønini.**

| | | |
|---|---|---|
| Amboðspeningur | 1,00% | kr 1,27 |
| Skitiarbeiðspeningur | 0,41% | kr 0,52 |
| Bergholsarbeiði | 8,28% | kr 10,48 |
| Dampketilsarbeiði | 8,28% | kr 10,48 |
| Olju-og lýsitangaarbeiði og arbeiði í smáum tangum | 8,28% | kr 10,48 |
| Skittfiska- og sildalastarbeiði | 8,28% | kr 10,48 |

Vanliga arbeiðsvikan er 40 tímar

**Bakarar:**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 04-07 | + kr 65 | kr 191,54 |
| Kl. 04-07 vikuskifti | + kr 100 | kr 226,54 |

**Servisufak:**

| | | |
|---|---|---|
| Leygardag kl. 08 – 14 | + 35% | kr 170,83 |
| aftaná kl. 14 | + 100% | kr 253,08 |

**Skiftisarbeiði:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. bólkur | | kr 126,54 |
| 2. bólkur | 6,63% | kr 134,93 |
| 3. bólkur | 9,11% | kr 138,07 |

**Serarbeiðarar:** (við útbúgving) 118,24

**Serarbeiðarar:** (uttan útbúgving)

| | | |
|---|---|---|
| 1. árið | | 113,25 |
| 2. árið | 1,45% | 114,89 |
| 3. árið | 2,92% | 116,56 |
| 4. árið | 4,41% | 118,24 |

**Starvstíðarviðbót**

Fyri 3 ára starvstíð 1,60%

**LÆRLINGALØNIR**

| | | Um tíman | Um vikuna |
|---|---|---|---|
| 1. árið 32% | 32% | kr 40,49 | kr 1.619,71 |
| 2. árið 40% | 40% | kr 50,62 | kr 2.024,64 |
| 3. árið 45% | 45% | kr 56,94 | kr 2.277,72 |
| 4. árið 55% | 55% | kr 69,60 | kr 2.783,88 |
| 5. árið 70% | 70% | kr 88,58 | kr 3.543,12 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Pensiónsgrunnur (lærlingar): | | | 7,50% |
| Fyri yvirarbeiði verður øll læruárini goldið | | | |
| serarbeið.løn á 1. ári | kr 113,25 | + hesi % | |
| Fyrstu 4 tímarnar | | + 35% | kr 152,89 |
| Næstu 3 tímarnar | | + 60% | kr 181,20 |
| Fylgjandi tímar | | + 100% | kr 226,50 |
| *Leygardag:* | | | |
| Fyrstu 5 tímarnar | | + 35% | kr 152,89 |
| Fylgjandi tímar | | + 60% | kr 181,20 |
| *Sunnu- og halgidagar:* | | + 100% | kr 226,50 |

**Lærlingaviðbøtur fyri forskotna tíð**

| | |
|---|---|
| *Bakaralærlingar* | |
| Allar dagar kl. 18.00 – 04.00 | kr 35,00 |
| Sunnu- og halgidagar kl. 00.00 – 24.00 og frídagar | kr 25,00 |
| *Kokka- og tænaralærlingar* | |
| Gerandisdagar kl. 18.00 – 06.00 | kr 4,00 |
| Leygar-, sunnu- og halgidagar | kr 5,50 |
| *Frisørlærlingar* | |
| Sunnudagar verða goldnir eins og yvirtíð hjá lærlingum | |

**ANNAÐ**

| | |
|---|---|
| *Gjøld sbrt. sáttmála:* | |
| VITAN (Eftirútbúgvingargr.) 2X10oyru/tím. | |
| Pensiónsgrunnur | 13,00% |

| | |
|---|---|
| *Lógarásett gjøld* | |
| Samhaldsfasti | 1,75% |
| ALS gjald frá 01.01.2012 | 1,25% |
| Barsilsskipan | 0,62% |
| Frítíðarløn | 12,00% |

Føroya Arbeiðsgevarafelag
tlf. 309900 · fax.309901

Føroya Handverksmeistarafelag
tlf. 309900 · fax.309901

Føroya Handverkarafelag
tlf. 312120 · fax.320420

/ Landsfelag Handverkaranna
tlf. 354800 · fax.354801














**1.juli 2013 lækkaðu vit prísin** · Seinnu árini hava vit havt færri skaðar og úrslitið hevur verið gott. Tí lækkaðu vit prísin á privatu akfars- sethúsa- og innbúgvstryggingum við heili 20%.

Soleiðis koma okkara góðu úrslit eisini tær til góðar, tí tað ert tú og øll, ið hava tryggingar hjá okkum, ið eiga Tryggingarfelagið Føroyar.

*Sí meira á trygging.fo ella ring 345600*

Høvuðsamstarvsfelagi hjá ÍSF
Oyggjaleikir 2013

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR